# Skilnaður millum listarfólk staðfestur

**Tey 12 listarfólkini, sum hava tikið seg úr felagnum Føroysk Myndlistafólk, gera nú eina nýggja Heystframsýning, sum kann metast sum eitt slag av mótspæli til Várframsýningina í Listaskálanum. Ein av teimum 12 viðurkennir, at hendan framsýning staðfestir ein skilnað millum føroysk listarfólk**

LIST
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Vit hava eina aðra meining enn tey, sum eru við í Føroysk Myndlistafólk, og tað ber til at siga, at tann nýggja framsýningin hjá okkum staðfestir ein skilnað, sum er millum listarfólkini, sigur Bárður Jákupsson, sum er ein av teimum 12, sum er við í nýggja listafólkabólkinum*

Tað er líkt til, at føroysk listarfólk eru ymisk sum árstíðirnar.

Í hesum døgum er tann árliga Várframsýningin, sum felagið Føroysk Myndlistafólk skipar fyri í Listaskálanum. 12 av teimum etableraðu listarfólkunum í Føroyum boykotta tó hesa framsýning, og nú hava tey gjørt av, at tey fara at gera sína egnu Heystframsýning seinni í ár.

– Eftir at vit tóku okkum úr felagnum Føroysk Myndlistafólk, taka vit ikki undir við arbeiðnum hjá tí felagnum. Vit hava tí gjørt ein bólk, sum fer at gera eina framsýning saman, sigur Bárður Jákupsson, sum er eitt av teimum 12 listarfólkunum.

– Endamálið hjá tí nýggja listafólkabólkinum er at hava framsýningar saman, og vit fara í øllum førum at hava eina árliga framsýning saman.

## Staðfesta skilnaðin

Seinastu mánaðirnar hevur stríð verið millum tveir bólkar av føroyskum listarfólkum. Stríðið er komið til sjóndar í nevndarvalum, setan av nýggjum leiðara fyri Listasavnið og nú eisini í sambandi við framsýningar.

12 listarfólk vóru so misnøgd eftir aðalfundin hjá felagnum Føroysk Myndlistafólk, har tey hildu seg verða við sviðusoð, at tey tóku seg úr felagnum. Seinni kom munurin millum hesi 12 og hini føroysku listarfólkini til sjóndar, tá ið leiðari skuldi setast fyri Listasavn Føroya.

Og nú er stríðið eisini komin inn í framsýningarhølini, tí tey 12 listarfólkini eru ikki við á árligu Várframsýningini, sum higartil hevur verið ein tann besta og fremsta framsýningin í føroyskari list.

– Vit hava eina aðra meining enn tey, sum eru við í Føroysk Myndlistafólk, og tað ber til at siga, at tann nýggja framsýningin hjá okkum staðfestir ein skilnað, sum er millum listarfólkini. Vit hava ikki lagt upp til nakra ósemju, men vit hava eina aðra hugsan enn Føroysk Myndlistafólk, sigur Bárður Jákupsson.

## Hugskotið at gera góða framsýning

Merkir tað, at tit hava gjørt ein nýggjan listafólkabólk, at tit bara fara at verða við á framsýningum, har limirnir í bólkinum eru við og ikki stilla út saman við øðrum føroyskum listarfólkum?

– Nei, tað merkir als ikki tað. Hesin bólkur hevur valt at samstarva um framsýningar, og tað er vanligt aðrastaðni, at listafólk finna saman á hendan hátt. Hugskotið er at gera eina góða framsýning.

*Vil tað siga, at hinar framsýningarnar í Føroyum er ikki nóg góðar?*

– Nei, eg skal einki siga um hinar framsýningarnar. Nú gera vit okkara, og so fáa vit at síggja, hvat fólk halda.

*Hvar verður Heystframsýningin?*

– Vit hava fleiri møguleikar, men hava ikki gjørt nakra avtalu enn.

*Verður framsýningin í Listaskálanum?*

– Vit hava onga avtalu gjørt við Listaskálan, so hon verður ikki har hesaferð. Men vit hava ikki gjørt av, hvar framsýningin verður.

### FAKTA

Á einum fundi tann 8. mars gjørdu 12 føroysk listarfólk av at seta á stovn ein listafólkabólk.

Endamálið er í fyrsta lagi at fyrireika framsýningar saman, og tann fyrsta framsýningin verður ein Heystframsýning, ið letur upp tann 24. september.

Tey 12 listarfólkini eru: Andrias Andreassen, Hanni Bjartalíð, Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Bárður Jákupsson, Rannvá Kunoy, Anker Mortensen, Olivur við Neyst, Marius Olsen, Torbjørn Olsen, Tróndur Patursson og Bjarne Werner Sørensen

# Rás 2 reyk út

**Um vikuskiftið hoyrdu norðoyingar einki frá Rás 2. Helst hevur óstøðugi streymurin gjørt seg inn á ein móttakara á Brúnaskarði. Seinnapartin mánadagin fór fólk frá Rás 2 á Brúnaskarð at rætta brekið**

RÁS 2
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað var tøgn á adressuni 107 Mhz á FM-bandinum um vikuskiftið. Hetta er staðið, har norðoyingar kunnu taka ímóti Rás 2, men um vikuskiftið hevur einki verið at hoyrt.

– Vit halda, at tað er ein digitalur móttakari, sum er frystur orsaka av tí teimum mongu streymslitunum leygarnáttina. Vit hava einaferð áður havt hendan trupulleika, og tá var tað hesin móttakarin, sum ikki toldi so óstøðugan streym, sigur Petur Jacobsen, sum er stjóri á Rás 2.

Seinnapartin mánadagin fóru fólk frá Rás 2 at kanna brekið, og Petur Jacobsen roknaði við, at Rás 2 aftur kundi hoyrast umvegis Brúnaskarð seinni mánadagin.

# Dimmalætting vil hava lesarar aftur til blaðið

**– Vit vilja gjarna hava lesaratalið uppeftir, og hetta er ein roynd at fáa lesarar aftur til Dimmalætting, sigur ábyrgdarblaðstjórin Ingi Samuelsen. Í dag kemur Dimma út í nýggjari og minni stødd**

DIMMA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*– Síðani eg gjørdist blaðstjóri, havi eg hoyrt mest sum dag og dagliga frá fólki, sum halda at støddin á Dimmalætting er ov stór, sigur Ingi Samuelsen, ábyrgdarblaðstjóri á Dimmalætting, nú blaðið kemur út í minni stødd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tey 84 árini við Dimmalætting í stórari stødd eru av. Mánakvøldið kom Dimmalætting á gøtuna í nýggjari og minni stødd – sonevndum tabloid-formati.

Ein høvuðsorsøk til broytingina er, at Dimmalætting vil hava lesaratalið hjá sær uppaftur.

– Síðani eg gjørdist blaðstjóri, havi eg hoyrt mest sum dag og dagliga frá fólki, sum halda at støddin á Dimmalætting er ov stór. Vit hava hugsa okkum væl um og hava tikið avgerðina um, at blaðið skal koma út í einari minni stødd. Hetta er serliga fyri at fáa teir yngru lesararnar meira við, sigur Ingi Samuelsen, ábyrgdarblaðstjóri á Dimmalætting.

– Samstundis stúri eg sjálvandi eisini eitt sindur fyri, hvat teir gomlu lesararnir hjá Dimmalætting fara at siga, nú teir fáa blaðið í nýggju støddini, tí sjálvandi hevur Dimma havt eina rúgvu av nøgdum lesarum, sum hava dámt blaðið í tí stóru støddini.

## Rákið er minni bløð

Fyrstu árini kom Dimmalætting út í tabloid-stødd, men síðani 1921 er Dimmalætting komin út í sonevndu broadsheet-støddini. Nú fer blaðið so aftur til tað minnu støddina, sum hini føroysku bløðini koma út í.

*Fyri einum góðum ári síðani segði tú, at konseptið hjá Dimmalætting passaði betur til eina stóra blaðstødd. Hví broyta tit so støddina nú?*

– Vit hava ásannað, at gongdin er tann vegin, at bløð, sum eru komin út í stórari stødd í nógv ár, eru farin niður í stødd. Tað síggja vit í londunum kring okkum, og vit hava hildið tað verða rætt, at Dimmalætting nú eisini kemur út í einari minni stødd.

– Vit ælta tó at gera okkara blað øðrvísi enn hini føroysku bløðini. Vit koma bara at arbeiða við opnum, tað vil siga tvørtur um ryggin á blaðnum. Tí kann mann siga, at vit arbeiða á somu síðustødd, sum vit hava gjørt higartil, men nú er støddin bara løgd á liðini, sigur Ingi Samuelsen.

## Vilja hava fleiri lesarar

Tá ið tú gjørdist blaðstjóri, setti tú tær fyri at venda niðurgongdini hjá Dimmalætting. Er hetta ein liður í tí arbeiðnum?

– Vit vilja gjarna hava lesaratalið hjá okkum uppeftir aftur, og hetta er ein liður í tí arbeiðnum. Tað hevur ikki gingið so lætt við at venda gongdini, sum eg hevði roknað við, og hetta er tí ein partur av arbeiðnum at venda gongdini. Vit vóna, at vit við einari minni blaðstødd fáa lesarar at koma aftur til blaðið.